

## Sjálvsálitið í lagi

Hóast hann noyddist málleysur av vøllinum, tá Wayne Rooney varð sendur á vøllin hósdagin, so ivast Michael Owen ikki í, at hann verður HM-toppskjútti.

– Eg varð herfyri spurdur, hvør verðru HM-toppskjútti. Men tað er nú ein heldur býttur spurningur. Sjálvandi verði eg toppskjútti, sigur Michael Owen við enska blaðið, The Sun.

Michael Owen hevur higartil spælt 79 landsdystir, og hevur hann skotið 36 mál í hesum.

**-mørk**

## Hørð lagna

Venjari hjá Paraguay var sum vera man knústur eftir tapið móti Svøríki.

– Hatta var ein pínufullur háttur at tapa uppá, men vit mugu samstundis ynskja Svøríki tillukku. Teir høvdu bóltin meira og teir skaptu fleiri møguleikar, segði Anibal Ruiz eftir dystin.

Hóast teir hava ein dyst eftir, so er greitt, at Paraguay er úti úr HM-kappingini. Einasta málið, sum teir enn hava skorað, var í egið mál í dystinum móti Onglandi.

-mørk

# Seinar avgerðir

**Bæði hjá Svøríki og Onglandi vórðu áskoðararnir hildnir leingi á pínubeinkinum, men tá alt kom til alt lagaðu úrslitini seg til fyrimuns fyri favorittarnar**

HM-BÓLKUR B
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Vit vistu, at tað fór ikki at verða lætt. Fólk hava tosað um, at talan var um lættan dyst, men vit vistu, at vit alla tíðina máttu halda okkum til okkara spæliætlan, um tað skuldi eydnast, og tað gekk at enda. Boðskapurin er greitt, at vit gevast ikki á hondum.

Soleiðis segði Davic Beckhamm, eftir at Ongland við bit og slit hevði togað ein 2-0 sigur heim móti undirmettu Trinidad & Tobago.



*Fredrik Ljungberg og Johan Elmander fegnast um málið, ið mest sum við vissu sendi Svøríki móti 1/8-finaluni*
*Mynd: Scanpix*

### Hálv fiasko

Talan var nærum um eina endurtøku av svensku fiasko'ini, tá Ongland spældi móti Trinidad & Tobago. Í 83 minuttir høvdu bretar eina hampuliga yvirvág, men tað eydnaðist teimum ikki at skora. Ikki minst høvdu Crouch og Lampard sínar møguleikar, uttan at hetta tó kostaði nakað av sær.

Og hinvegin hevði Trinidad & Tobago í tveimum førum sera naskar royndir, tá Paul Robinson var farin á eydnuleysa útferðir eftir innleggum, og í seinna førum var tað bert ein akrobatisk bjarging frá John Terry, sum forðaði einum leiðslumáli.

Sjey minuttir fyri leiklok brast tó fyri nev, tá Peter Crouch stútaði innlegg frá Beckham í kassan. Og so kundi Steven Gerrard í yvirtíðini høgga eitt vinstrabeinsskot upp í krossin til endastøðuna.

### Sviar væl fyri

Eisini Svøríki mátti bíða leingi, tá teir í seinasta dystinum í gjár bastu Paraguay. Eftir javnleikin móti Trinidad & Tobago vóru sviar noyddir at vinna, men hetta gekk ongan veg.

At ein hálvskaddur Zlatan varð skiftur út tíðliga í seinna hálvleiki hjálpti millum lítið og einki, men tveir minuttir fyri dystarlok kom forloysandi málið. Fyri fyrstu ferð í 11 mánaðir kom Fredrik Ljungberg á talvuna, tá hann stútaði ein tvørbólt niður í svørðin og í málið.

Sigurin ber við sær, at Svøríki nú er mest sum komið víðari úr bólkinum. Skulu sviar enda á triða plássinum er kravið, at teir tapa fyri Onglandi og at Trinidad & Tobago vinna á Paraguay, og tað tykist í øllum førum hampuliga ósannlíkt, tó at tað ikki kann útilokast.

| HM-endaspælið | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Bólkur A** | | | | | | | **v** | **t** | | |
| | **d** | **v** | **-** | **j** | **-** | **t** | **mál** | **mál** | **+/-** | **stig** |
| 1 Ecuador | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 5 | 0 | 5 | 6 |
| 2 Týskland | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 5 | 2 | 3 | 6 |
| 3 Póland | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 4 Costa Rica | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 2 | 7 | -5 | 0 |
| **Bólkur B** | | | | | | | **v** | **t** | | |
| | **d** | **v** | **-** | **j** | **-** | **t** | **mál** | **mál** | **+/-** | **stig** |
| 1 Ongland | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 6 |
| 2 Svøríki | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 4 |
| 3 Trinidad & Tobago | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 0 | 2 | -2 | 1 |
| 4 Paraguay | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 0 | 2 | -2 | 0 |
| **Bólkur C** | | | | | | | **v** | **t** | | |
| | **d** | **v** | **-** | **j** | **-** | **t** | **mál** | **mál** | **+/-** | **stig** |
| 1 Argentina | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 2 Holland | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 3 Fílabeinsstrondin | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 4 Serbia & Montenegı | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| **Bólkur D** | | | | | | | **v** | **t** | | |
| | **d** | **v** | **-** | **j** | **-** | **t** | **mál** | **mál** | **+/-** | **stig** |
| 1 Mexico | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 2 Portugal | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 3 Angola | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 4 Iran | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| **Bólkur E** | | | | | | | **v** | **t** | | |
| | **d** | **v** | **-** | **j** | **-** | **t** | **mál** | **mál** | **+/-** | **stig** |
| 1 Kekkia | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 2 Italia | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 3 Ghana | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |
| 4 USA | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| **Bólkur F** | | | | | | | **v** | **t** | | |
| | **d** | **v** | **-** | **j** | **-** | **t** | **mál** | **mál** | **+/-** | **stig** |
| 1 Australia | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 2 Brasil | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 3 Kroatia | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 4 Japan | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| **Bólkur G** | | | | | | | **v** | **t** | | |
| | **d** | **v** | **-** | **j** | **-** | **t** | **mál** | **mál** | **+/-** | **stig** |
| 1 Suður Korea | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 2 Frakland | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 3 Sveis | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 4 Togo | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| **Bólkur H** | | | | | | | **v** | **t** | | |
| | **d** | **v** | **-** | **j** | **-** | **t** | **mál** | **mál** | **+/-** | **stig** |
| 1 Spania | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 4 | 0 | 4 | 3 |
| 2 Saudi Arabia | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 2 | 2 | 0 | 1 |
| 3 Tunis | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 2 | 2 | 0 | 1 |
| 4 Ukraina | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 4 | -4 | 0 |

# Ecuador skrivaði søgu

Fyri fyrstu ferð nakran tíð vann Ecuador seg víðari úr bólkaspælinum í HM-kappingini, tá teir í gjár bastu Costa Rica við 3-0.

Costa Rica varð annars undan kappingini mett sum eitt av liðunum, sum væl kundi arga nakað, men móti Ecuador høvdu teir ikki tað stóra at siga. Longu eftir átta minuttum legði Carlos Tenorio Ecuador á odda, og so hevði liðið mest ynskiliga útgangsstøðið.

Costa Rica megnaði sjáldan at hótta leiðsluna, og tá Delgado tíðliga í seinna hálvleiki smekkaði bóltin í kassan til 2-0, var at kalla leyst og liðugt.

Trivaligi sigurin ber við sær, at Ecuador nú er á odda í bólki A, har eitt umfar restar. Seinasti dysturin er móti týsku vertunum, og tað er kanska væl hugsandi, at liðini her fara at spara einstakar lyklaspælarar. Lítið er tó at ivast í, at týskarar helst vilja vinna bólkin, og til hetta er kravið nú ein sigur.

### Hava einki vunnið

Hóast luttøkan í 1/8-finalunum soleiðis er tryggjað, so heldur stóra stjørnan hjá Ecuador, Agustin Delgado, at liðið enn ikki hevur nakra orsøk at fegnast.

– Enn hava vit ikki vunnið nakað. Vit vilja vinna okkum so langan veg í kappingini, sum tað á nakran hátt ber til. Og so fáa vit at síggja, um nakað er at fegnast um, heldur hann.

**-mørk**